FØROYA LANDSSTÝRI.

Tórshavn, 28. november 1951.

Til

Føroya Løgtinga.

Løgtingsmál nr. 38/1951: Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

Landsstýrið loyvir sær at framleggja viðlagda álit og uppskot til løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá serligari nevnd sett av Føroya landsstýri.

K. Djurhuus.
Løgmaður.

/J. Djurhuus.

BÝARSKIPANARNEVNDINI

sett av Føroya landsstýri.

**Á L I T.**

Í apríl 1949 samtykti landsstýrið at seta nevnd at gera upp-
skot til byggilóg og lóg um býarskipanir.
Til nevndina skuldi landsstýrið velja 2 limir, Tórshavnar býráð
2 og Tórshavnar bygginevnd 1.
Hesir vórðu valdir:
Fyri landsstýrið: Johan Djurhuus, skrivstovustjóri og Aksel Kjær,
landinspektørur.
Fyri býráðið: Hanus við Høgadalsá, býráðslimur og Poul Guttesen,
býarverkfrøðingur.
Fyri bygginevndina: H.C.W. Tórgarð, býráðslimur, arkitektur.
Johan Djurhuus varð av nevndini valdur formaður.
Áðrenn nevndin varð sett, hevði landsstýrið og Tórshavnar býráð
vent sær til Ministeriet for Byggeri og Boligvæsen um at fáa tænastu-
mann haðani, sum kundi vera stýrinum og býráðnum til hjálpar í arbeið-
inum og at gera uppskot til byggi- og býarskipanarlóg fyri Tórshavn.
Ministerið setti Vagn Rud Nielsen, fulltrúa, cand.jur. til hetta ar-
beiðið. Tá ið nevndin var sett og tók við arbeiðinum, varð Vagn Rud
Nielsen hjálparmaður nevndarinnar. Hann var í Føroyum í oktober 1949.
Longu í 1947 vóru framkomin ynski um at broyta galdandi byggi-
lóggávu. Froðbiar sóknar kommuna vendi sær í brævi 20. november 1947
til løgtingið við uppskoti til nýggja byggilóg. Uppskotið fyriskriv-
aði: reglur um bygging móti veg, brunaskjøldur og aðra verju móti
eldsvanda, vatnleiðing, minstamark fyri hvussu nógv av byggilendum
skal vera óbygt, verjutiltøk av heilsuligum grundum, um byggihátt o.s.
fr. Løgtingið samtykti tá at senda uppskotið til hinar kommunurnar,
og lata byggikønan mann geva ummæli sítt. Síðani skuldi so málið
leggjast fyri løgtingið aftur, sambart Lgt. 1947, bls. 207. Málið varð
sent kommununum, men bert heilt fáar (5) søgdu sína støðu; tær sum
svaraðu vóru tó fyri uppskotinum ella í hvussu so er fyri at broyta
núgaldandi byggilóggávu, sum ófullfíggjaða. Tórshavnar kommuna ynskti
at fara eitt stig longur enn henda tilætlaða lóggávan, eftirsum kom-
munan sum frammanfyri umtalað eisini helt tað vera neyðugt at gera
eina býarskipanarlóg.
Høvuðslógirnar í núgaldandi byggirætti er lóg frá 28. januar
1856 "om oprettelse af en bygningskommission for Thorshavn" og konglig
fyriskipan frá 16. juni 1882 "om bygnings og brandvæsenet i de færøske
landkommuner," sambart § 18 í lóg frá 28. februar 1872 "om de færøske
landkommuners styrelse."
Lóg frá 28. januar 1856 fyri Tórshavn setir bygginevnd, ið skal
gera eitt yvirlit yvir, hvussu vegir, óbygd øki o.s.fr. býarins skulu
leggjast, og skal henda ætlanin so við og við setast í verk. Til at
nevndin kann ansa eftir, at ikki verður bygt móti ætlanini, skulu
allar byggingar, umbyggingar o.t. verða tilmeldaðar nevndini og síð-
ani góðtiknar av landsstýrinum. Lógin gevur nevndini víðar ræsur í
síni ætlan, um bygging v.m. skal verða loyvd.
Sama skipan við bygginevnd verður eisini fyri bygdakommunurnar
fyrisett við nevndu kongligu fyriskipan frá 1882. Her verður tó bein-
leiðis ágegt, hvørjum sjónarmiðum nevndin skal arbeiða eftir. Hon skal
ansa eftir, at ætlað bygging ikki kemur at forða fyri, at gjørdir
vegir kunna røkjast, at húsini verða sett hampuliga eftir hvørjum
øðrum, og at vegirnir so við og við fáa eina hóskandi breidd í mun
til hæddina av húsunum og onnur viðurskifti bygdarinnar. Gongur
byggingin móti hesum sjónarmiðum, kann hon noktast, tó við rætt til
kæru til landsstýrið.
Allar bygginevndir skulu ansa eftir, at byggingin er forsvarlig,
tá ið hugsað verður um eldsvanda. Nevndirnar hava hesum viðvíkjandi
yvirhøvur kravt, at hús mugu ikki verða nærri marki enn 3 alin uttan
so, at brunaskjøldur er móti markinum.
Tá ið talað verður, um hvørji mark lóggávan setur fyri bygging
og fyri annað ræði yvir føstum ognum við tí endamáli, at almenning-

til tvangs[illegible] lóg frá 1. apríl 1909 um [illegible]
havnir, lendingar og skúlar, lóg frá 1. apríl 1909 um [illegible]
havnir, lendingar og skúlar, 22 § í lóg nr.147,
lóg frá 28. apríl 1916 um kirkjur og kirkjugarðar, 22 § í lóg nr.147,
27. marts 1939 um útskifting 31, 32 og 35 §§ í jarðalógini nr. 174,
24. mai 1937 o.fl.

Felags fyri alla her umtalaðu lóggávu er, at kommunurnar taka
ein meir ella minni átroðkandi spurning upp til viðgerðar fyri seg,
meðan ein samlað býarskipan, sum inniber tey ymisku samfelagsligu
rímiligu og neyðugu sjónarmið í eini heild kann ikki gjøgnumførast.
Øll henda lóggáva er gomul og tíðin nógv broytt síðani, og er hon
gjørd í pørtum.

Nevndin hevur sostatt mett um trongdina til tíðarhóskandi býar-
skipanir og byggilóggávu fyri Tórshavnar bý og bygdirnar.

Nevndin er undir sínum kanningum komin til tað úrslit, at stórur
tørvur er á at fremja býarskipanir og eina byggilóggávu, sum tryggja
eina skilagóða bygging.

Sethúsa- og vinnulig bygging hevur livitíð í mannsaldrar. Skiping
av býarløgum og av einstakum byggingum kann soleiðis ikki latast upp
í hendurnar á teim einstøku, sum best ber til, men tað má krevjast, at
tann einstaki bygningurin fellur inn í býarskipanina sum hon er, so-
leiðis at skilaloysi kann umgangast og hartil spell bæði í arbeiði og
tilfari.

Tørvurin at sleppa undan skilaloysi verður størri tess tættari
og meira býarkend byggingin er.

Hinumegin eigur ein byggi- og býarskipanarlóg at skipast so, at
hon ikki óneyðugt forðar eini rímuligari nýtslu av staðsins náttúrligu
møguleikum.

Nevndin hevur fingið til handa upplýsingar um býarskipanar- og
byggilóggávu í hinum norðurlondunum. Við hesum sum grundarlag verður
hildið, at líkindi fyrst eiga at gerast fyri fremjing av býarskipan
fyri Tórshavnar bý og tær stórru bygdirnar, meðan ein nútíðar byggi-
lóggáva, sum skal avloysa galdandi lóggávu og samtyktir, kann steðga
til hesar býarskipanar eru framdar.

Tað er nevndarinnar ætlan, at tørvandi byggireglur eiga at verða
framdar skjótast til ber. Nevndin mælir tí til, at býarskipanarnevndin,
møguliga økt við limum, sum umboða bygda interessur, fáa heimild til
at seta fram uppskot til almennar byggireglur.

Nevndin hevur fingið gjøllar upplýsingar um donsku býarskipanar-
og byggilóggávuna.

Galdandi danska býarskipanarlógin nr. 181 frá 29. apríl 1938 sum
broytt við lóg nr. 211 frá 23. apríl 1949 endurprentað sum kunngerð
nr. 242 frá 30. apríl 1949 í lóg um býarskipanir fyrisetur, at hvør
keypstaður og hvør onnur heildarbygging, sum fyri mestapartin tænir
øðrum endamáli enn landbúnaði og hevur meira enn 1.000 í fólkatali,
skal útvega sær býarskipan.

Haraftrat hevur húsaministeriet heimild til at treyta kommunu-
stýrum at útvega býarskipan.

Í eini tílíkari býarskipan kunnu tær í lógini tilskilaðu reglur
takast upp m.a. hvar vegir skulu liggja, hvønn veg teir skulu venda
og breidd teirra, hvar torg skulu liggja, leidningar, almennir bygg-
ningar og lundir v.m. Eisini kann avgerð takast um sløg av bygging,
teirra býti eftir bíggjarløgum og teirra sniði og varðveitslu eftir
verandi eyðkenni í bygging og planting. Eisini kunnu reglur gerast um
skiping av bygging í landbúnaðinum v.m. við tað, at fyri kann setast,
at bert byggningar í tess endamáli kunnu loyvast bygdir.

Eftir býarskipanarlógini frá 1938, smbr. kunngerð nr. 242 frá
30. apríl 1949, skulu býarskipanir aftaná at tær eru lagdar fram til
eftirlits, tinglesast.

Býarskipanarlógin frá 1938 hevur eisini ymsar reglur um samskiping
av býarskipanum innanfyri umdømi, sum umfata fleiri kommunur og um
ognartøku. Galdandi danska býarskipanarlóggáva inniheldur lóg nr.148
frá 29. marts 1939 um byggilóg fyri staðin København, byggilóg fyri
Frederiksberg kommunu frá 19. apríl 1890, smbr. lógarkunngerð nr. 212
frá 1. august 1912 og byggilógin fyri keypstaðirnar frá 30. desember
1858, smbr. lógarkunngerð nr. 210 frá 1. august 1912. Úti á landinum
galda bert reglurnar í lóg nr. 174 frá 31. marts 1926 um brandpoliti
úti á landinum, sum inniheldur nakrar fáar byggireglur.

seinast lóg nr. 109 frá 23. april 1915 um aftrat at fáa til vega byggireglugerðir fyri umdømi úti á landinum og byggireglur fyri keypstaðirnar og kommununa København smbr. § 75 eru tíðarhóskandi byggireglur framðir fyri keypstaðirnar og byggireglugerðir fyri sóknarkommunurnar.

Býarskipanarlógin frá 1938 hevur til endamáls yvirhøvur at leggja lag á bygginginа og vøkstur hennara, meðan teirra fremjing skulu fara fram eftir avgerðum sambart kommunalum samtyktum, eitt nú byggivega - og heilsusamtyktum.

Eftir at býarskipanarlógin frá 1938 var framd hevur tað verið hildið, at regulerandi byggireglur, t.d. húsahæddir kunnu takast upp í byggisamtyktir og reglugerðir við fullum gildi.

Sum vera man mugu býarskipanir miða langt frameftir, og tað má tí gerast neyðugt at rokna við framtíðarviðurskiftum, sum skulu rúmast innanfyri. Fyri at tær reglur í býarskipanum, sum tilevnaðar eru sum samtykt - hesar skulu tinglýsast - tí ikki skulu vera ovlítið sigandi, hevur ministerium hildið fram, at fremjingin av bundnari skipan um býarskipanir fyri býir við meira enn 1.000 íbúgvarum er hildin fyri fyrst, um bert partvísar skipanir eru gjørdar, tá fullfíggja frágreiðing um kommununa ætlan yvirhøvur verður send inn samstundis.

Ministerium hevur sambart hesum góðkent sonevndar býarætlanir fyri mangar býir.

Hesar býarætlanir innihalda høvuðsreglurnar fyri býarins ætlaða vøkstur og sýna seg sum ein frágreiðing til ministeriið um tær ætlanir fyri býarins vøkstri, sum kommunustýrið vil halda seg eftir í síni mannagongd til fremjingar av býarskipanum.

Kommunustýrisins frágreiðing um framtíðar vøkstur hevur sína grund í eini kanning av teim berandi faktorunum fyri býarins vøkstur - teim sonevndu forarbeiði.

Undir einum er mannagongdin í danskari býarskipan tann, at høvuðsreglurnar fyri býarins vøkstri leggjast í eini býarskipan og haraftrat tær almennu reglurnar um byggihæddir, bygging, ljósrúmdir v.m. í byggireglugerðir og hinar meira einsæris reglurnar oftani servitutkendar í partvísar býarsamtyktir.

Eftir teim omanfyri givnu upplýsingum um danska mannagongd í býarskipanaviðurskiftum hevur nevndin aftra seg at mæla til beinleiðis at nýta danska býarskipanarlóggávu sum fyrimynd fyri eini føroyskari.

Nevndin hevur tessvegna evnað til eitt uppskot til løgtingslóg um býarskipan og byggisamtyktir sum eftir nevndinnar ætlan skulu verða dánaði til føroysk viðurskifti. Lógaruppskotið hevur í stóran mun sína grund í donsku býarskipanarlóggávuni, men nevndin hevur roynt at komið sær undan meinbogunum í henni.

Lógaruppskotið er soleiðis evnað til, at tað ber til beinanvegin sum lógin er komin í gildi at fremja býarskipan fyri Tórshavn og tær bygdir, sum landsstýrið heldur hava hetta fyri neyðini.

Haraftrat er uppskotið evnað so til, at tað er gjørligt at fremja byggisamtyktir við býarskipan- og byggikendum reglum, uttan at nýggj lóg skuldi verið neyðug.

Nevndin hevur hervið hildið seg hava eftirkomið trongdini til skjótt at fáa býarskipanir framdar, samstundis sum arbeiði til fremjingar av byggisamtyktum, sum ger býarskipan bindandi fyri tann einstaka grundeigara og annars kann innihalda fyriskilandi reglur, kunnu leggjast niður so vítt kommunal vald hava uppskot til býarskipanir í umbúna.

Nevndin vil fyri sítt viðkomandi leggja dent á, at tað ikki eftir lóggávuuppskotinum er neyðugt at fremja býarskipan fyri at byggisamtykt kann góðkennast.

Fyri smærri bygdaløg heldur nevndin ikki trongd vera sum er at fremja býarskipanir.

Nevndin vísir annars til viðmerkingarnar til hinar einstøku reglurnar.

Løgtingslóg um býarskipanir og byggi-samtyktir.

1. §

1. partur. Landsstýrið kann, tá ið eitt kommunustýri (býráð ella sóknarstýri) mælir til tess, góðkenna býarskipan fyri hesa kommunu ella ein part av henni.

2. partur. Tórshavnar kommuna skal, áðrenn 3 ár eru liðin, aftaná at henda lóg er komin í gildi, hava fingið í lag eina býarskipan fyri Tórshavnar kommunu. Landsstýrið kann tó eftir áheitan frá Tórshavnar býráði, og um býarskipanarnevndin smbr. 2. § játtar tí, leingja hesa tíðarfreist.

3. partur. Tá ið annars hildið verður neyðugt at fáa gjørda býarskipan fyri eitt vist øki, kann landsstýrið, um býarskipanarnevndin tekur undir, fyriskipa tí ella teimum kommunustýrum at útvega eina býarskipan. Kortini kann ikki verða kravt, at kommunustýrið skal hava fingið býarskipan í lag við styttri enn 2 ára ávaring. Somu treytir galda, tá ið hildið verður neyðugt at broyta eina áður góðkenda býarskipan.

4. partur. Til at ráðgerðir um býarskipanir fyri eitt øki, ið umfatar fleiri kommunur, kunna verða samskipaðar, kann landsstýrið seta nevnd, ið skal verða kommunustýrunum til hjálpar í arbeiðinum við at fáa býarskipan í lag fyri øki alt. Koma hesar kommunur ikki ásamt um víddd ella innihald býarskipanar, avger býarskipanarnevndin tretuna og ásetir á hvønn hátt útreiðslurnar við samskipanini skulu verða býttar millum hesar kommunur.

5. partur. Verður ikki gjørt eftir hesum skyldum og fyriskipanum, kann landsstýrið við undirtsku býarskiparnevndarinnar fáa til vega ella broyta eina býarskipan fyri ummælda øki. Kommunan, ella um so er kommunurnar, gjalda útreiðslurnar.

6. partur. Til at útvega ella broyta eina býarskipan samsvarandi 5. parti, hevur landsstýrið vald til at fremja øll mál, sum annars eftir hesi lóg og lóggávuni yvirhøvur liggja undir kommunustýrinum.

Býarskipanarnevndin.

2. §

1. partur. Í býarskipanarnevndini sita 3 manns: ein formaður, sum Føroya løgting velur, og 2 limir, annar valdur av Føroya landsstýri, annar av Tórshavnar býráð.

2. partur. Landsstýrið kann umframt seta 2 í býarskiparnarmálum serkønar menn í nevndina, men hesir hava ongan atkvøðurætt.

3. partur. Tiltakemenn skulu verða valdir fyri formannin og hinar nevndarlimirnar.

4. partur. Allar avgerðir nevndarinnar verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Tann kommuna, sum serligan áhuga hevur fyri tí máli, ið nevndin hevur til viðgerðar, hevur rætt til at senda umboðsmann, ið persónliga kann greiða nevndini frá sjónarmiðum kommununnar.

5. partur. Nevndin situr í 6 ár. Nevndin skal verða sett so skjótt sum tilber, aftaná at henda lóg er komin í gildi.

6. partur. Landskassin ber allar útreiðslur nevndarinnar, haruppí roknað samsýning til serfrøðingarnar og til skrivara nevndarinnar.

3. §

1. partur. Í eini býarskipan skal verða greitt frá, hvussu økið, ið skipanin umfatar, er vorðið í løtuni, og hvussu tað er ætlað skipað og bygt.

2. partur. Í býarskipan skal í minsta lagi verða greitt frá hesum her aftaru nevndu umstøðum so gjølla, sum neyðugt er til at vissa hóskandi og haldgóða skipan fyri byggi-, vega-, og havnaviðurskiftum nú og í framtíðini:
1) Hvar ið vegir eru, leið og breidd teirra, byggilinjur, hvussu hornini eru sneidd, og hvussu og hvar vegir koma saman.
2) Hvar ið opin økir og annað tílíkt, ætlað almennari ferðslu, eru.
3) Hvar ið vatnveitingar, frárennsl, ravmagns- og telefonveitingar og tílíkt liggja.
4) Hvar ið almenn hús, torg, leikvøllir, spælipláss og annað havnaøki, viðalundir, kirkjugarðar eru.
5) Hvussu økið er bygt, hvørji húsasløgini eru, og hvussu økið er býtt teirra millum viðvíkjandi hædd og støddi, og um bygt er lágt ella høgt og trunkað og viðvíkjandi nýtslu, um húsini eru sethús, krambúðir, virkishús (neyst og fiskapláss uppítald) ella økið er dyrkilendi (træðir uppítaldar).

3. partur. Býarskipanar skulu fylgja øll neyðug kort og flattekningar, sum, har tað tørvar, skulu merktar verða við hæddarmátum.

4. partur. Góðkend býarskipan kann verða broytt ella víðka eftir teim í 1. § ásettu reglum. Eitthvørt kommunustýri hevur í umsiting síni yvirhøvur skyldu at ganga fram eftir góðkendari býarskipan.

Byggisamtyktir.

4. §.

1. partur. Tá ið eitt kommunustýri mælir til tess, kann landsstýrið góðkenna eina byggisamtykt fyri hesa kommunu ella part av henni.

2. partur. Hevur ein kommuna samsvarandi 1. § fingið í lag býarskipan, skal hon í seinasta lagi 1 ár aftaná, at henda býarskipan er góðkend, senda landsstýrinum til samtyktar uppskot til byggisamtykt fyri tað øki, býarskipanin umfatar. Landsstýrið kann tó loyva, at byggisamtyktin bara skal umfata ein part av býarskipanini.

3. partur. Landsstýrið kann annars, um býarskipanarnevndin tekur undir við tí, áleggja eini kommunu at útvega byggisamtyktir fyri kommununa ella part av henni, við tí í 5. § 2., 3. og 5. parti nevnda innihaldi. Landsstýrið kann somuleiðis áleggja kommunu at broyta eina góðkenda byggisamtykt. Viðvíkjandi slíkum áleggingum og frama teirra galda reglurnar í 1. § 3., 4., 5. og 6. parti. Umframt kann landsstýrið seta tær við byggisamtykt umrøddu ætlanir í verk, so umfatandi sum neyðugt er, fyri kostnað kommununa.

Innihald byggisamtykta.

5. §.

1. partur. Er ein samsvarandi 1. § góðkend býarskipan til skjals, skulu reglurnar í byggisamtyktini verða gjørdar í samljóði við býarskipanina.

2. partur. Ein byggisamtykt skal annars so langt sum tær serligu sókna og staðarumstøður gera tað ráðiligt, bera í sær reglur, ið roynst hava neyðugar at vissa hóskandi og haldgóða skipan fyri vega- og byggiviðurskiftum nú og í framtíðini.

3. partur. Í byggisamtykt, ið býtt kann verða í tvær ella fleiri deildir, skulu við teimum í 2. parti nevndu reglum í huga verða tiknar fyriskipanir um hesi mál:

[illegible]
av ólógligum standum, og um hjálp frá politivaldinum til tess smbr. 22. §.

3) Um undantøkur og kærur viðvíkjandi avgerðum, ið byggivaldið hevur tikið.
4) Um eykagjald til byggivaldið fyri at viðgera byggimál og annað.
5) Um húsasmíð viðvíkjandi byggihátti og bruna- og heilsuumstøðum o.s.fr. har nevnt skal verða, um rúmini eru ætlað at vera í, at arbeiða í ella at búgva í o.s.fr.
6) Um hvar ið vegir skulu verða, leið teirra og breidd og annað, samanber 3. §, 2. part nr. 1, bæði viðvíkjandi vegum yvirhøvur og viðvíkjandi einstøkum vegum.
7) Um hvar ið opin øki og annað skulu verða, samanber 3. §, 2. part nr. 2.
8) Um hvar ið veitingar skulu verða, samanber 3. §, 2. part nr. 3.
9) Um hvar ið almenn hús, torg og annað skulu verða, samanber 3. §, 2. part nr. 4.
10) Um húsasløgini, hædd teirra og nýtslu og hvar á lendinum hvørt húsaslagi má verða bygt samanber 3. §, 2. part, nr. 5.
11) Um hvussu stór og í hvørjum standi byggilendi skulu verða.
12) Um hvussu stórur partur av økinum nýttur og bygdur skal verða.
13) Um hvussu langt skal verða millum hús á sama byggilendi, hvussu langt skal verða frá húsum til vegir ella byggilinjur og til mark grannans.

<u>4. partur.</u> Umfremt tær í 3. parti í hesi grein nevndu reglur kann í byggisamtykt verða fyriskipað:

14) Hvussu langt og breitt byggilendi skal verða.
15) Hvussu hús skulu standa á byggilendi, og hvussu víða tey mega standa.
16) Hvussu húsini skulu síggja út viðvíkjandi samsvarandi hæddum, reisingum ella serligum klædningi og annað sovorðið.
17) Um og á hvørjum lendum bygt kann verða úr viði ella øðrum eldfimum tilfari.
18) Hvussu og við hvørjum gyrt skal verða og hvussu høg gyrðing eigur at vera.
19) Varðveitan av einum øki við teimum eyðkennum, tað higartil hevur havt annaðhvørt viðvíkjandi byggihátti ella viða- og/ella plantuvakstri.

<u>5. partur.</u> Saman við byggisamtykt skulu liggja øll neyðug kort og flatteknigar, sum, har ið tað tørvar, eiga at verða merktar við hæddarmátum.

<u>6. partur.</u> Ein góðkend byggisamtykt kann verða broytt ella víðkað við nýggjum og greiniligari reglum viðvíkjandi teim í 3. og 4. parti umrøddu viðurskiftum eftir reglunum, sum settar eru fyri nýggjar samtyktir.

<u>Kunngerð og framløga byggisamtykta.</u>

6. §.

<u>1. partur.</u> Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrinum, skal tað verða lagt fram í minnsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 3 mánaðir eru liðnir frá kunngerðardegnum.

<u>2. partur.</u> Innkomið mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki tekur við, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrinum til góðkenningar.

<u>3. partur.</u> Landsstýrið kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góð-

4. partur. Somuleiðis kann kommunustýrið, tá ið tað, orsakað av innkomnum mótmælum ella broytingaruppskotum, hevur samtykt at broyta hitt upprunaliga uppskotið, fáa í lag, at uppskotið við hesum broytingum verður framlagt av nýggjum.

5. partur. Viðvíkjandi uppskotum, ið viðgjørd verða eftir reglunum í 4. §, 3. parti, avger landsstýrið, nær og hvussu hesi uppskot skulu verða framløgd til eftirlitið umrøtt í hesi grein.

Kunngerð og tinglestur byggisamtykta.

7. §.

1. partur. Beinanvegin byggisamtyktin er góðkend skal kommunan fyri egnan kostnað kunngera hetta á vanligan hátt.

2. partur. Umfatar byggisamtyktin fyriskipanir, ið bara viðkoma einum einstøkum húsi ella eftir áskoðan kommunustýrisins nøkrum fáum húsum, sammett annaðhvørt við talið á teimum, ið byggisamtyktin umfatar ella við talið á øllum húsum í kommununi ella sum fastleggur, hvar ið serstakur vegur skal verða, leið og breidd hansara og so frameftir, ella hvar ið byggilinja skal verða, hvar ið almenn hús, torg og tílíkt skulu verða, skal byggisamtyktin, soakjótt sum tilber, aftaná at hon er góðkend, verða tinglisin fyri kostnað kommunurnar.

3. partur. Vanligar reglur um, hvar ið vegir skulu verða, leið og breidd teirra o.s.fr., um býti av byggiháttum á einum øki, um hædd húsanna og annað, skulu vanliga ikki verða tinglisnar. Kommunustýrið kann kortini lata bæði hesar og aðrar reglur í byggisamtyktum tinglesa. Landsstýrið hevur rætt til fyri kostnað kommunurnar at lata tinglesa, tá ið stýrið heldur tað verða neyðugt eftir lógini ella gagnligt, tó at kommunustýrinum ikki hevur tøkt tinglestur verða kravdan ella neyðugan.

Fyribils forboð.

8. §.

Tá ið eitt kommunustýri, ið hevur byggisamtykt í umbúnað, biður um tað, kann landsstýrið nokta fyri, at ein ogn, ið ætlandi kemur inn undir byggisamtyktina, verður nýtt á slíkan hátt, ið hildið verður ósamsvarandi byggisamtyktini. Slíkt forboð má bara galda eitt ár, og kann ikki, uttan býarskipanarnevndin samtykkir, verða sett meira enn hesa einu ferð.

Virkan av uppskoti til byggisamtyktar.

9. §.

1. partur. Beinanvegin kunngerðin, ið umrødd er í 6. §, 1. parti, er vorðin lýst, má fyribils einki øki, ið samtyktin umfatar, verða bygt ella á annan hátt nýtt í mótstríði við hana samanber 10. §, uttan loyvi frá teirri yvirvøld, ið gjørt hevur hitt framlagda uppskoti. Sýtir kommunustýrið slíkum loyvi, kann málið verða lagt fyri landsstýrið.

2. partur. Er byggisamtyktin ikki vorðin góðkend, áðrenn eitt ár er liðið frá kunngerðardegnum, fellur henda umrødda virkan av kunngerðini burtur. Landsstýrið kann leingja freistina, ið frammanfyri er nevnd til 6 mánaðar, tá ið hetta verður hildið ynskiligt fyri at fáa enda á viðgerðini av uppskotinum, ið liggur fyri.

Virkan av góðkendum byggisamtyktum.

10. §.

1. partur. Góðkenda byggisamtykt skulu virða ikki bara teir, ið ogn-

eru [illegible]

2. partur. Á einum øki, sum góðkend byggisamtykt umfatar, skal annars eingin ogn verða nýtt, verða bygd við nýggjum húsum ella verða umbygd ella sundurbýtt uttan samsvarandi byggisamtyktini.

## Byggilinjur við akvegir.

11. §.

1. partur. Heldur landsstýrið tað verða neyðugt fyri almennaferðslu at vissað verður vegi størri breidd til víðkanar ella til at fáa betri útlit yvir slíkan veg, kann landsstýrið eftir teimum í 6. og 7. §§ fyrisettu reglum í eini samtykt gera av, hvussu byggilinjur fram við vegnum skulu vera.

2. partur. Ein byggilinja, ið er samtykt, hevur somu ávirkan sum tær í 10. § nevndu byggisamtyktir, at allar bygg[illegible] víðvoknaðir septiktankar og annað, skulu verða hildnar í minnsta lagi so langt frá vegi, sum byggisamtyktin tilskilar ella frá miðlinjum vegsins. Er ivamál um, hvar miðlinjan er, avger landsstýrið tað.

3. partur. Á sama hátt verða 12.-14. §§ nýttar, tá ið hesir vegir verða víðkaðir, og tá ið goldið skal verða endurgjald, orsakað av byggilinjukravi, tó soleiðis at í hesum §§ skal verða lisið landsstýrið í staðin fyri kommunustýrið.

## Ognartøka o. a.

12. §.

1. partur. Grundir, hús, vøtn og áir, brúgvar og annað, sum eru privat ogn, og sum neyðug eru til tey í góðkendari byggisamtykt ætlaðu tiltøk, vegir, torg, leikvøllur, spæliplass, kirkjugarðar og til veitingar av ymsum slagi ella til at byggja á tey í samtyktini almennu hús og annað, ella til at útvega onnur byggilendi, ella sum tað annars hevur umráðandi týdning fyri hitt almenna at hava ræði til at seta reglur í verk samtyktarinnar skulu, tá ið kommunustýrið krevur tað, verða latnar fyri endurgjøld eftir teimum fyriskipanum, sum henda lóg ásetir.

2. partur. Privatur servituttur ella nýtslurættindi, sum ikki verða hildin, verða úr gildi eftir 10. §, 1. parti sum ósamsvarandi teimum í byggisamtyktini góðkendum reglum fyri, hvussu eitt øki skal verða bygt ella nýtt í framtíðini, men sum tað kortini hevur almiklan týdning fyri hitt almenna at ráða yvir til at kunna fremja eina byggisamtykt, kann kommunustýrið krevja latnar fyri endurgjald eftir reglunum í hesi lóg.

3. partur. Tann, ið eigur slíkt øki, ella hevur rættindi til tess, kann leggja spurningin, um tað er neyðugt samsvarandi hesi lóg at lata tað koma fyri landsstýrið, áðrenn 3 mánaðar aftaná almenna kunngerð, um avgerð kommunustýrisins. Umframt skulu, alt tað er gjørligt, ognarmaður ella hann, ið rættindi hevur, fáa beinleiðis boð um hesa avgerð.

13. §.

1. partur. Tá ið tað samsvarandi byggisamtykt verður kravdur ein partur av eini ogn ella av rættindum í sambandi við hana, og tann parturin av ognini, ið eftir er, aftaná ta kravdu avhending, eftir ætlan metingarnevndarinnar fær slíka støddu, snið, legu og umstøður annars, at hann ikki longur vil kunna verða nýttur sum sjálvstøðug ogn, soleiðis sum fyrr, kann ognarmaður, áðrenn 3 mánaðir eru liðnir, aftaná almenna kunngerð um avhending krevja, at kommunan tekur alla ognina fyri fult endurgjald. Henda sama rætt hevur ognarmaður, tá ið ognin hevur ligið saman við virki, sum hon ikki eftir metingarnevndarinnar ætlan rættiliga kann verða nýtt saman við, aftaná ta kravdu

__2. partur.__ Hevur kommuna kravt ogn avhendaða eftir hesum [illegible] nevndu reglum, skal virðið við endurgjaldsútrokningini verða ásett eftir tí, ið ognin higartil hevur verið nýtt.

## __Endurgjald.__

### 14. §.

__1. partur.__ Tá ið eitt øki samsvarandi byggisamtykt er lagt av til almenn hús ella virki, ella er ætlað til vegir, torg ella annað soverðið, og ognarmaður tess eftir meti metingarnevndarinnar smbr. 15. § missir møguleikan at nýta teir fyrimunir, ið økið hevur á rímiligan og forsvarligan hátt sammett við, hvussu grannaøkini í roynd verða nýtt, kann ognarmaður krevja, at kommunan skal taka alt økið fyri endurgjald.

__2. partur.__ Er økið bara ein partur av ognini, og vil avhendingin fáa tað í 13. § nevndu ávirkan á tann partin, ið eftir er, kann kravið um ognartøku kommununnar umfata alt øki, sum tað er.

__3. partur.__ Ognarmaður kann umframt krevja, at kommunan tekur ogn hansara fyri endurgjald, um so er, at tær í eini byggisamtykt umrøddu vega- og byggilinjur valda, at tann parturin av einum higartil óbygdum byggilendi, ið bygt kann verða á, verður so lítil ella soleiðis vorðin, at metingarnevndin metir hann vera óhóskandi til húsagrund. Sama rætt hevur hann, ið eigur eitt lendi, ið higartil hevur verið bygt á annaðhvørt aftaná at húsini eru niðurtikin, niðurbrend, ella á einhvønn annan hátt burturbeind, ella aftaná byggivaldið hevur avgjørt, at ein ætlað bygging á lendinum tá ið hin núverandi bygging á lendinum er niðurbrotin ikki kann verða framd samsvarandi reglunum í byggisamtyktini.

__4. partur.__ Krav um ognartøku eftir 1. parti kann verða sett fram nær sum helst. Krav um ognartøku eftir 3. parti skal vegna uppskots til vega- og byggilinjur, tá ið tað viðvíkjur einum óbygdum lendi, verða sett framm, áðrenn freistina, ið avmarkað er í 6. §. Viðvíkjur ognartøkan eina higartil bygda ogn, kann kravið eftir 3. parti verða sett fram, tá ið tann verandi byggingin er burturbeind, ella tá ið uppskot um nýggja bygging á lendinum kann ikki verða sett í verk.

__5. partur.__ Krav um ognartøku eftir teimum reglum, ið nevndar eru í 1. og 3. parti, skal verða sett fram fyri ta kommunu, ið hevur beint málið til metingarnevndina.

__6. partur.__ Metingarnevndin skal royna at bøta um tær ónáðir, ið standast av hesum við býtum samsvarandi 20. §.

__7. partur.__ Tekur kommunan eitt øki ella eina ogn eftir reglunum í 1., 2. og 3. parti, skal virði økisins ella ognarinnar verða sett í samband við tær umstøður, ið grunda kravið um ognartøkuna, uttan at farið verður eftir teirri í byggisamtykt ætlaðu nýtslu av økinum ella ognini.

__8. partur.__ Kommuna fær sloppið sær undan skylduni til at yvirtaka lendi ella ogn móti endurgjaldi við – í seinasta lagi 6 vikur aftaná at hon er vorðin kunnug við avgerð metingarnevndarinnar – at gevast við kravinum um avvarðandi tilætlanir.

## __Vanligar reglur um endurgjald.__

### 15. §.

Støddin av tí endurgjaldi, sum ognarmaður eftir 12.-14. §§ eigur at fáa, verður, tá ið annað ikki er tilskilað sett av eini metingarnevnd. Í hesi nevnd sita 2 manns, ið landsstýrið velur fyri 6 ár í senn, annar teirra skal verða formaður nevndarinnar og tveir málinum óviðkomandi manns valdir av dómsvaldinum. Standa at-

16. §.

Nevndin skal í øllum endurgjaldsmálum, ið viðgjørd verða samsvarandi hesi lóg, taka afturat sær serkøna hjálp, ið skal verða við í øllum samráðingum, um tey endurgjaldsmál, ið liggja fyri og leiðbeina nevndina í øllum tekniskum spurningum, ið koma fyri í málinum, men atkvøðurætt eiga teir ongan. Landsstýrið skjýtur upp hesar serfrøðingar so nógvar, at nevndin hevur 4 serfrøðingar at velja ímillum.

17. §.

Nevndin skal avgera á hvønn hátt, útreiðslur fyri viðgerð málsins skulu verða goldnar, eisini samsýning til nevndarlimir og til serfrøðingar og kann krevja, at hann, ið reist kærumálið hevur, sum trygging frammanundan skal seta í veð vissa peninganøgd til hesar útreiðslur. Tær útreiðslur, ið nevndin ásetir, kunnu verða pantaðar.

18. §.

<u>1. partur.</u> Landsstýrið skrivar nevndini fyriskipan um, hvussu útreiðslur fyri viðgerð av málum skulu verða greiddar, endurgjald útroknað o.s.fr.

<u>2. partur.</u> Í hesi fyriskipan kann verða tilskilað, at tá ið endurgjald verður ásett, skal virðisøkingin, sum ognin verður mett at fáa av teimum gjørdu tiltøkum, verða frádrigin. Av hesum kann endurgjald heilt falla burtur, tá ið tey gjørdu tiltøk mett verða at geva ognarmanni størri fyrimun enn virði av tí latna øki ella rættindum er.

19. §.

Endurgjald fyri veðbundna ogn verður, tá ið onnur avgerð er ikki gjørd, goldið millum veðeigarnar í teirri røð, ið bøkur sorenskrivarans vísa veðrættindi teirra, og só nógv sum neyðugt er til fullnaðargjald veðeigarans fyri ta virðislækkan av veðtrygging teirra, ið ognartøkan ella avhendingin voldu, meðan ognarmaður fær tað av endurgjaldinum ið loypir av, um so er.

<u>B ý t i.</u>

20. §.

Metingarnevndin skal í teimum í 13. og 14. §§ umrøddu viðurskiftum, tá ið tað er gjørligt, fáa í lag býti annaðhvørt við peningagjaldi ella við ognarbýti. Verður ikki semja um málið á vanligan hátt, kann metingarnevndin, tá ið staðarumstøðurnar tala fyri tí, krevja, at lendi, ið nevndin virðismetir til sama virði, skulu verða ognarbýtt.

<u>Tiltøk, sum nema tvær ella fleiri kommunur.</u>

21. §.

Trætumál millum tvær ella fleiri kommunur um, hvør ella hvørjar, ið gjalda skulu endurgjald ella útreiðslur við at fremja tey í byggisamtykt fyriskipaðu tiltøk, avger býarskipanarnevndin.

<u>Revsing, broyting o.a.</u>

22. §.

Í eini byggisamtykt kann verða tilskilað (sbr. 5. §, 3. part nr. 2), at ólýdni móti reglum í hesi lóg og teimum í henni settu fyriskipanir og forboð verður revsað við bót frá 40 kr., og at tann, ið brýtur hesa lóg, hevur skyldu at bøta tann við lógarbrotinum íkomna stand, og soleiðis, at landsstýrið, tá ið serligar um-

svarandi fyriskipanum í hesi lóg.

## Sakarmál.

23. §.

Sakarmál viðvíkjandi einum um nýtslu lógarinnar reistum spurningi, sum umsitingarvaldið ikki eigur at avgera endiliga sjálvt, skal verða reist áðrenn 6 vikur eru lidnar, aftaná at kærumaðurin hevur fingið frásøgn um ta avgerð, ið ynskt verður roynd.

## Atgongd til máting.

24. §.

1. partur. Ein og hvør ognarmaður hevur skyldu, aftaná í minnsta lagi viku ávaring at geva landsstýrinum ella kommununi atgongd til at útinna tey arbeiði, ið neyðug eru til at útvega ella endurkanna býarskipanir og byggisamtyktir, og at lata tey undir slíkum arbeiðum sett merki verða órørd.

2. partur. Skulu hesi merki ikki bara standa heilt stutta tíð, skulu tey verða sett á girðing, hús ella nærhendis teimum ella niður í svørðin, soleiðis at tey ikki førða fyri, at ognin kann verða nýtt sum vant.

## Gildi lógarinnar.

25. §.

Henda lóg kemur í gildi tann .....................

## Avtøka av eldrum fyriskipanum.

26. §.

1. partur. Landsstýrið fær vald til í hvørjum einstakum føri, tá ið byggisamtykt er góðkend, aftaná at hava fingið viðmæli frá tí kommunustýri, byggisamtyktin viðvíkjur, at avgera, hvussu umfatandi eldri byggilógir, fyriskipanir o.a. skulu verða í gildi saman við byggisamtyktini.

2. partur. Har tað í lóggávuni orðið "býarskipan" hevur verið nýtt, skal orðið "byggisamtykt" verða nýtt í staðin fyri ella javnbjóðis tí, tá ið lóggávan ikki skilliga tilskilar annað.

## V-i-ð-m-e-r-k-i-n-g-a-r

til

nakrar §§ í ~~[illegible]~~ logaruppskotinum.

Til 1. §. Tá býarskipanir mugu legnast eftir landsins framburði yvirhøvur, verður tað hildið rímuligt, at góðkenningarvaldið liggur hjá hægsta umsitingarvaldi landsins, landsstýrinum. Tað fær tó undir sær eina býarskipanarnevnd, sum fær líkindi til meinkunnleika til kommunal viðurskifti.

Hvussu mikið landsstýrið fer at gera nýtslu av kønari hjálp til metingar um innkomin úppskot, ella um tað vil gera nýtslu av tí kunnleika, sum býarskipanarnevndin fær høvi at taka sær, stendur opið.

Tað hevur ikki verið ætlanin at tilevna lógaruppskotið so, at allar bygdir yvir eina vissa støðd ella eitt nú tær, sum hava havn, neman Tórshavnar kommunu, skulu hava skyldu at fáa sær býarskipan. Men landsstýrið fær líkindi til eftir gjørdum royndum at stíla so fyri, at tað verður treytað kommunum í tørvandi muni at fáa sær býarskipan. Í 3. § er skilað til, hvat býarskipan skal innihalda.

Ætlingin við regluni í 4. parti um mynding av eini samskipingarnevnd er, at hon skal nýtast, har býur liggur í 2 ella fleiri kommunum. Reglan kann eisini koma í nýtslu fyri størri øki, um so er, at royndir skuldu sýnt tað tørvandi at skipa samløg, nevniliga býarskipanir fyri 2 ella fleiri kommunur, sum sína millum kunnu hava áhugamál, hvør móti aðrari, skipast saman so nýtiligt úrslit kann fáast í bygging av havna- og samferðsluviðurskiftum innanfyri økið.

Til 2. §. Soleiðis sum skotið er upp at mynda býarskipanarnevndina, er tað ætlanin at fáa í henni umboð bæði fyri landsins og kommunana áhugamál.

Dentur eigur at verða lagdur á, at samanhangur eigur at vera í arbeiði nevndarinnar, og tí er virkistíð hennara sett til 6 ár.

Til 3. §. Við hesi reglu trongist innihald býarskipanar til at innihalda viðurskifti, sum mugu ætlast at hava serligan týdning fyri býarins ella bygdanna vøkstur. Ætlanin er, at bert tilíkar reglur um tey í hesi grein nevndu viðurskifti, í so miklum muni, sum tey kunnu hava týdning fyri vøkstur býarins ella bygdanna, skulu takast við.

Er tað ikki neyðugt, skal býarskipanin minkast til bert at nema tilík viðurskifti.

Ein góðkend býarskipan er ein sáttmálabinding millum landsstýrið og ta kommunu um, at hon í síni umsiting yvirhøvur vil fylgja teim reglum, sum settar eru í býarskipanini. Býarskipan verður bindandi fyri hvønn einstakan grundeigara, tá byggisamtykt er framd eftir 4. §.

Til 4. §. Har býarskipan er, má innihaldið av teim reglum, sum takast við í byggisamtyktini vera samsvarandi tí. Tað er byggisamtyktin, sum ger býarskipanina bindandi fyri tann einstaka grundeigarin.

So sum skilað til í innganginum verður tað ikki í øllum førum neyðugt at hava fingið sær býarskipan, áðrenn byggisamtykt er framd.

Tá byggisamtykt er góðkend, víkja allar higartil galdandi reglur av tilsvarandi slagi.

Til 5. §. Reglurnar í 1. parti eru bert ætlaðar til leiðbeiningar. Vísir tað seg, at býarskipanin eftir at hon er góðkend, ikki er nóg álítandi sum grundarlag undir tilevning av byggisamtyktini, verður tað ikki torført samstundis við byggisamtyktini at gera broyting í býarskipaniniog senda landsstýrinum hana til góðkenningar. Dentur verður lagdur á, at byggisamtykt og býarskipan samsvara.

Um innihaldið í eini byggisamtykt annars geldur tað sama sum tilskilað er undir 3. §. um innihaldið í einum býarskipan. Tað er ikki neyðugt, í byggisamtykt at taka upp reglur um øll tey í 3. parti undir nr. 1 - 13 nevndu viðurskifti. Men kommunustýrini mugu gjølla ætla um

reglur eftir 3. parti.

Høvi til, so sum skotið upp í 3. parti, at liða byggisamtykt í 2 ella fleiri deildir fær ætlandi týdning, serstakliga tann vegin, at byggisamtykt verður gjørd, sum tekur meginpartin av teim reglum, sum eiga at galda fyri ein bý, meðan reglur, t.s. um nýggj vegalendi til almenna nýtslu verða tiknar upp í eina byggisamtykt fyri seg.

Her verður eisini víst til 7. §. 2. og 3. part um tinglesing av konkretum reglum í byggisamtykt,

Tey undir nr. 1 - 13 í 3. parti nevndu viðurskifti falla í fylgjandi deildir eftir tí endamáli, teim er ætlað at tæna:

a: nr. 1 - 4 hava í hyggu at gera líkindi til at gera upp eina skilagóða umsiting og at tilevna tær formellu reglur í eini byggisamtykt eftir teim viðurskiftum, sum eyðkenna tey einstøku umdømi.

b: nr. 5 gevur høvi til eina tilevning av teim konstruktivu reglunum eftir gjøllari kanning av søgubundnum byggistíli og hóskandi byggihátti.

c: nr. 7 - 9 geva líkindi til deils at fyrisæta, t.d. eina ella fleiri vegabreiddir yvirhøvur og deils at vissa lendi í almennum endamáli.

d: nr. 10 - 13 gevur líkindi til fyri býarins vokstur so týdningarmikla sk... an í bygging bæði í einum býti í ymiskar býlingar annaðhvørt við høgari ella lágari bygging, búsetur ella vinnulig viðurskifti og um fyriseting av tíðarhóskandi reglum um byggingarstig, ljósteinar v.m. Einki forðar fyri, at tílíkar reglur eru ymiskar fyri hinar einstøku býlingarnar.

Í 4. parti er uppaftur givið einum kommunustýri líkindi til eina gjøllari skiping av byggingini.

Ætlingin hevur eisini verið í nr. 19 at geva líkindi til varðveitslu av virðismiklum býlingum ella økjum, soleiðis at tað almenna hervið fær fylgt við í býarins vøkstri yvirhøvur.

Til 6. §. Tá tað er av størsta týdningi fyri tann einstaka, at hann fær høvi til at gerast kunnugur við tær regulerandi reglur, sum ætlast framdar á ogn hansara, verður skotið upp, at víðgongdar almenningur um uppskot til byggisamtykt verður tryggjaður.

Lagt verður í geyma, at 3 mánaða frestin og haraftrat kommunustýrisins viðgerð av kærumálum og tí endaliga uppskotinum, kann gera tað torført at halda 1 árs frestina eftir 4. §, 2. parti. Bent verður tó á líkindi til at senda inn uppskot til býarløg og byggisamtykt samstundis.

Til 7. §. Við hesi reglu, serliga 2. og 3. parti hevur verið roynt at útvega eina skipan, sum eftir teim í Danmark gjørdu royndum fremur fyrilit fyri tí einstaka børgaranum og interessuni í, at kommunurnar ikki ovbyrjast av útreiðslum og ómaki í tinglesing, hvørs virði, so vítt teim almennu reglunum viðvíkir, má ætlast heilt ivasamt.

Til 8. §. Tá ein tíð má ganga, áðrenn ein byggisamtykt kann fremjast, verður tað hildið hóskandi at skjóta upp eina reglu, sum gevur kommununum høvi til í forhond at forða tiltøkum, sum vilja koma í stríð við komandi byggisamtykt.

Til 9. §. Í framhaldi av tí sum flutt er fram til 8. §., verður tað hildið rímuligt, at ein grundeigari ikki í tíðarskeiðinum, sum má ganga millum kommunustýrisins samtykt av uppskoti til byggisamtykt og landsstýrisins góðkenning, kann fremja tiltøk, sum eru í stríð við byggisamtyktar endamál og reglur.

Til 11. §. Við almennar vegir, sum liggja uttanfyri býarøki ella við tílík minni býarøki, har tað vil vera ivasamt, um byggisamtykt eigur at fremjast, kann tó trongd vera at tryggja tílíkum vegum víðkanir til mest møguligan trygleika fyri ferðsluni, uttan at tað skuldi verið neyðugt fyri ein einstakan veg at fremja byggisamtykt fyri tað býarøki.

Til 12. §. Tey seinnu árini hevur tað verið ringt at fáa byggilendi vegna stórar tilflytingar, serstakliga í Tórshavn og teim størru bygd-

fremja ognartøku til útvegingar av byggilendi.

Hesin møguleiki er í grundini longu, nú 35.§. í lóg nr. 174 frá 24. mai 1937 om jordbrugets fremme loyvir bundna avhending av lendi til byggigrundir.

Til 13.§. Henda reglan samsvarar við vanliga ognartøku mannagongd.

Til 14.§. Henda regla gevur úttrykk fyri sama prinsippi, sum liggur undir 13.§.

Hon hevur í hyggju at verja grundeigara móti, at kommunustýri við útlegging av ogn hansara ella øki av henni í almennum endamáli, avsker honum nýtsluna av ognini samsvarandi býarins vøkstri yvirhøvur.

Á sama hátt eigur grundeigari líkindi til endurgjald fyri missir vegna tess, at vegur ella byggilinja fer gjøgnum ogn hansara, afturímóti ætlast grundir ikki at vera fyri endurgjaldi fyrr enn tann tíð kemur, at eigarin, um hann ikki kann gera nýtslu av hesi reglu, vildi liðið miss. Frestin í 4. parti er sett so, at kommunustýrið fær høvi til yvirlit, hvørjar peningaligar fylgir fremjingin av vegi ella byggilinju vil hava við sær.

Annars verður at strika undir, at grundeigari ikki fær endurgjald fyri reglur í byggisamtykt um nýtslu av lendi hansara ella um byggingarstig og tær ljósvíddir, sum havast skulu fyri eggu við bygging, hóast reglan í sær hevur eina nýtsluskerjing.

Harafturímóti skal endurgjald sjálvandi veitast fyri veruligar ognar avhendingar.

Til 15.§. Samansetingin av metingarnevndini, so sum hon er skotin upp, hevur verið roynt at gagna almennum og privatmanna interessum. Nú 2 av limunum framvegis skulu sita í nevndini, hevur verið roynt at útinna, at nevndin fær líkindi at vinna sær tørvandi royndir av teim viðgjørdu málunum, soleiðis at eins avgerðir kunnu fremjast í málunum.

Til 16.§. Tá býarskiping er hildin fram sum eitt nýtt rættarøki, hvørs sjónarmið oftani mugu ætlast at hava serteknisk eyðkenni, hevur tað verið hildið neyðugt, at nevndin fær høvi til tørvandi rættleiðingar.

Til 19.§. Tær her uppskotnu reglur eru úttrykk fyri vanligum ognartøkurætti.

Til 20.§. Gjøgnum tey umskifti, sum skotin eru upp, skuldu líkindi givist, at kommunur í summum førum kunnu fremja byggisamtykt við minni útreiðslum enn annars uttan at nerva reglurnar í byggisamtyktini.

Til 25.§. Tá lógin um býarløg og byggisamtyktir bert er heimildarlóg, sum ikki inniheldur posetivar reglur um byggingar, longd, skorsteinar v.m., er tað neyðugt, at higartil galdandi lóggáva verður í gildi til byggisamtyktir eru framdar.

Tórshavn, hin 23. november 1951.

J. Djurhuus. Hanus við Høgadalsá. P. Guttesen.

A. Kjær. H.C.W. Tórgarð.